# ítróttur

Nr. 72 • leygardagur • 16. apríl 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

## Dystir um vikuskiftið

**Fótbóltur - Formula-deildin**

| | | |
|---|---|---|
| 17.04 | KÍ-Skála | Petur Skarðenni |
| 17.04 | HB-TB | Dagfinn Olsen |
| 17.04 | VB-GÍ | Georg Rasmussen |
| 17.04 | EB/S-NSÍ | Oddmar Andreasen |
| 17.04 | ÍF-B36 | Páll Augustinussen |

**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 17.04 | EB/S-KÍ | Jan á Líðarenda |
| 17.04 | GÍ-FSV04 | Jan Gardar |
| 17.04 | B36-AB | Edvard Højgaard |

**Hondbóltur - Sunset-kappingin**

| | |
|---|---|
| 17.04 | Stjørnan-Neistin |
| 17.04 | StÍF-Tjaldur |
| 17.04 | VB-Søljan |




*Dagliga sita beiggjarnir lið um lið á skrivstovuni, men sunnudagin eru teir á hvør sínum liði*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

EB/Streymur-NSÍ:

# Beiggjar og toppskjúttar

**Báðir hava teir tikið ímóti gylta skógvinum. Teir eru beiggjar, og teir arbeiða lið um lið á skrivstovuni hjá Tryggingarsambandi num. Men sunnudagin eru teir mótstøðumenn**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Tað stendur Petersen við hampuliga stórum bókstavum undir vónunum hjá ávíkavist NSÍ og EB/Streymi fyri nýbyrjaða kappingarárið. Helgi og Sonni hava báðir tveir sýnt gott máltev í skjótt fleiri ár, og báðir hava teir eisini roynt at tikið ímóti heiðrinum sum besti málskjúttin í føroyskum fótbólti. Kanska eitt sindur sermerkt, at hetta hjá hvørgum teirra var í barndómsfelagnum, NSÍ, men í ávíkavist GÍ og EB/Streymi.

### Gongd á málskjótingina

Og meðan Helgi nú aftur er at síggja í Runavík, so er Sonni framvegis partur av liðnum hjá EB/Streymi, har hann í fjør treivst sera væl undir liðini av Sorin Anghel.

Higartil hevur sjúka tó darvað Sonna nakað, og sjálvur heldur hann, at tað skal vera nú, at gongd kemur á málskjótingina.

- Tað sigur seg sjálvt. Eg havi kanska ikki veri á toppinum, men eg havi so verið á vøllinum eina løtu í trimum dystum, og tað er ikki nøktandi, tá einki mál er komið.

*Og at NSÍ er mótstøðuliðið. Ger tað ikki uppgávuna eyka spennandi?*

- Tað ger tað heilt víst. Tað vilja væl altíð vera serligar kenslur tengdar at slíkum dysti, tí tú kennir mótstøðuliðið somikið væl. Men tað er farið, tá dysturin byrjar. Tað eru fleiri lið, sum liggja við fýra stigum, og so er kravið trý stig, um vit skulu fylgja við, heldur Sonni.

Hjá EB/Streymi er Fróði Clementsen helst tøkur aftur, eftir at hann fekk heilaskjálvta í dystinum móti GÍ fyri tveimum vikum síðani. Einast ivamálini tykjast vera Knút Vesturtún og Egil á Bø, sum báðir hava verið sjúkir í vikuni.

### Stig eru kravd

Heldur ikki Helgi hevur verið serliga aktivur higartil í kappingini. Ein lítil vøddaskaði hevur argað nakað, men hetta skuldi nú verið av. Og eisini Helgi er ivaleysur um, at nú skulu stig til.

- Vit vunnu fyrsta dystin, men síðani hevur talan bara verið um eitt stig í tvær vikur, og tí er sigurin eitt krav. Vit vilja vera við frammi í oddinum, og tí skulu trý stig á borðið. Men eg má viðganga, at tað verður ikki lætt. EB/Streymur hevur eitt gott lið, og í fjør taptu vit jú á Eiði, so tað skal í øllum førum stríðast fyri søkini, heldur hann.

Helgi sigur annars, at teir í Runavík hava at kalla allar mans tøkar. Helgi sjálvur og Gert Langgaard hava verið darvaðir av skaðum, men teir eru tøkir aftur. Einasta ivamálið er helst Sjúrður Jacobsen, sum varð skaddur í dystinum móti HB, og sum ikki hevur spælt síðani.

# Martin nær við IM-normi

TALV
*www.faroechess.fo*

Annað árið á rað luttóku Martin Poulsen og Hans Kristian Simonsen í Dubai Open, sum varð telvað í døgunum 04-12. apríl. Serliga væl gekk hjá Martini, sum hesaferð luktaði IM-normin.

Kravið hjá Martini fyri at vinna sær sín fyrsta IM-norm, var sigur í seinasta umfari ímóti IM Hameed (2371). Men Martin fekk ikki rættiliga fótin fyri seg í hesum talvi og mátti tíverri lúta. Martin vinnur tó fitt av rating fyri úrslitið niðri í hitanum í Dubai.

Eins og Martin fekk Hans Kristian 4 stig av 9 møguligum. Hans Kristian hevði eina miðalgóða kapping og stendur nøkunlunda í stað í rating.

Ungi og ókendi Wang Hao (2484) vann óvæntað kappingina framanfyri fleiri stórmeistarum. Wang fekk 7 stig og heili tíggju stórmeistarar fingu 6,5 stig.

### Christian Klien settur á beinkin

Ungi Red Bull koyrarin Christian Klien hevur verið stóra samrøðuevnið í formel 1 seinastu vikurnar. Hóast eina lovandi ársbyrjan hava Red Bull valt at skifta Klien út. Ì staðin koyrir Vitantoni Liuzzi. Fyribils skal Liuzzi koyra 3 koyringar. Síðan verður støða tikin, um hvør skal koyra restina av árinum.

Klien hevur megnað at fingið stig í tveimum teimum fyrstu koyringunum, og hetta er meira enn nakar hevði roknað við. Vegna ein tøkniligan trupulleika steðgaði hann upp í seinastu koyring. Hetta er sjálvandi ikki hansara skuld, og man neyvan verða orsøkin til løgnu viðferðina, sum Red Bull hava sýnt honum.

Christian Klien sigur seg verða keddan um avgerðina, men sigur samstundis, at hann er sannførdur um at hann fer at koyra fyri Red Bull aftur tá Liuzzi hevur roynt seg í trimum koyringum. Koyrt verður formel 1 aftur næsta vikuskiftið á Immola breytini í Italia

**-NuD**